Álit

í

løgtingsmáli nr. 34/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirløn (Eftirlønarlógin) (Greiðari ásetingar um, nær útgjøld byrja og inngjøld steðga, heimildin fyri frítøku í sambandi við tíðaravmarkað starv verður strikað, umframt tekniskar broytingar og fylgibroytingar av broyttari lóggávu á almannaøkinum)

Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum, Ruth Vang, hevur lagt málið fram 4. november 2025, og eftir 1. viðgerð 6. november 2025 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 18. november 2025 og 6. januar og 9. februar 2026.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Vinnuhúsið, Betri Pensjón, Verkafólk, Áhugafelagið Antares og landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang, saman við ávikavist Gjaldstovuni og TAKS.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Endamálið er sambært lógaruppskotinum at lætta um umsitingina av eftirlønarlógini fyri borgarar, TAKS og fyri arbeiðsgevarar.

Broytingarnar, ið verða skotnar upp, tilsamans 17 í tali, snúgva seg um alt frá at gera greiðari, nær uppspararar fara í útgjald, nær inngjald steðgar og til fylgibroytingar vegna ymsar lógarbroytingar á almannaøkinum, til dagføringar av tølum fyri minstamark fyri eftirlønargjald, til heimild at rinda munin millum eftirlønarskipan uttanlands og ta føroysku og til at gera broytingar í krøvunum hjá útlendskari arbeiðsmegi at rinda inn til eftirløn.

Nevndin tekur undir við, at útlendsk arbeiðsmegi skal rinda inn til eftirløn og við broytingini kann fáa samansparingina útgoldna, um farið verður úr Føroyum áðrenn 5 ár eru liðin; og við, at hesi ikki skulu hava búð í Føroyum seinastu 10 árini, um søkjast skal fyri aðru ferð um at fáa eftirlønaruppsparing útgoldna.

Á hendan hátt verður arbeiðsmegin í Føroyum javnsett, og hædd verður tikin fyri sosialum- og eftirlønarviðurskiftum hjá útlendskari arbeiðsmegi, um hon verður verandi í Føroyum. Nevndin heldur ikki, at tað eigur at vera ein kappingarparametur hjá føroysku vinnuni, at arbeiðsmegin, sum kemur higar til lands, ikki skal spara upp til eftirløn, men fáa eftirlønina útgoldna.

Undir 1. viðgerð varð nógv gjørt burtur úr broytingini, sum fer at krevja, at uppsparari skal fara í útgjald av kravdu eginuppsparingini, tá eftirlønaraldur er náddur. Betri Pensjón gjørdi í

hoyringarskrivi vart við, at rætturin til at útseta útgjald av eginuppsparing ikki átti at verða tikin burtur. Eisini hóast bert ein evarska lítil prosentpartur undir verandi lóg útsetir hesi útgjøld.

Undir viðgerðini er tað vorðið greitt, at tað kann vera skilagott, at uppsparari kann útseta útgjald í eginpensjón, inntil hann fer í útgjald við síni almannapensjón, men ikki longur, tí mótrokning í almannapensjón í sambandi við høgar pensjónir av øðrum slagi hevur týdning í mun til haldføri fyri føroyska samfelagið.

Reglurnar eru í dag sbrt. § 9, stk. 1 at "*Eftirlønarútgjald kann, við undantaki av stk. 5 og 9, í fyrsta lagi byrja, tá ið eftirlønarsamansparari nær fólkapensjónsaldri sbrt. lóg um almannapensjónir, og í seinasta lagi tann dagin, hann fær fólkapensjón.*"

Hetta merkir, at samansparingar kunnu fara í útgjald við fólkapensjónsaldur, men persónar kunnu eisini útseta tað at fara í útgjald til tey móttaka fólkapensjónina, til dømis um tey eru í skipanini viðvíkjandi útsettari pensjón.

Fíggjarmálaráðið hevur eftirfylgjandi heitt á nevndina um at varðveita verandi reglur, og hesum tekur nevndin undir við og setir tí fram broytingaruppskot hesum viðvíkjandi.

Fíggjarmálaráðið hevur eisini kunnað nevndina um, at tað er vorðið varugt við, at neyðugt verður at leggja eina orðing afturat tí einu greinini í lógaruppskotinum.

Talan er um § 1, nr. 15 í lógaruppskotinum. Broytingin snýr seg um uppskotini til nýggju stk. 10-12 í § 9 í eftirlønarlógini.

Í lógaruppskotinum verður skotið upp at seta soljóðandi nýtt stk. 12 í § 9 í eftirlønarlógini: "*Ásetingarnar í stk. 2, um býtið av samansparda virðinum útgjaldsdagin, og í stk. 6, um útgjøld, eru galdandi fyri útgjøld sbrt. stk. 11.*"

Fíggjarmálaráðið hevur mælt nevndini til, at ein orðing verður løgd aftrat uppskotinum omanfyri til nýtt stk. 12 um, at *fáa eftirlønarveitarar ikki onnur boð frá eftirlønarsamansparara í sambandi við útgjald sbrt. stk. 11, verður ásett, at 15 prosent av samansparda virðinum verður goldið út sum kapitalútgjald, 45% sum lívrenta og restin sum lutaeftirløn.* Hesum tekur nevndin undir við.

Nevndin setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. § 1, nr. 13 verður strikað.
   Nr. 14-17 verða eftir hetta nr. 13-16.

2. Í § 1, nr. 15, sum verður nr. 14, verður í stk. 10 ",", sum stendur aftan á orðið "áðrenn" strikað.

3. Í § 1, nr. 15, sum verður nr. 14, verður í stk. 12 aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Fær eftirlønarveitari ikki onnur boð frá eftirlønarsamansparara í sambandi við útgjald sbrt. stk. 11, verður ásett, at 15 prosent av samansparda virðinum verður goldið út sum kapitalútgjald, 45% sum lívrenta og restin sum lutaeftirløn."

Viðmerking til broytingaruppskot.

Til nr. 1
Eftir áheitan frá Fíggjarmálaráðnum verður broyting nr. 13 strikað.

Til nr. 2
Fíggjarmálaráðið hevur varnast eitt komma, sum av misgáum er komið skeivt fyri millum orðini "áðrenn" og "útgjald" í uppskotinum til nýtt stk. 10 í § 9 í lógini. Hetta verður við hesum rættað.

Til nr. 3
Í lógaruppskotinum verður skotið upp at seta soljóðandi nýtt stk. 12 í § 9 í eftirlønarlógini:
"*Ásetingarnar í stk. 2, um býtið av samansparda virðinum útgjaldsdagin, og í stk. 6, um útgjøld, eru galdandi fyri útgjøld sbrt. stk. 11.*"

Eftir áheitan frá Fíggjarmálaráðnum verður ein orðing løgd aftrat uppskotinum til § 9, stk. 12 um, at *fáa eftirlønarveitarar ikki onnur boð frá eftirlønarsamansparara í sambandi við útgjald sbrt. stk. 11, verður ásett, at 15 prosent av samansparda virðinum verður goldið út sum kapitalútgjald, 45% sum lívrenta og restin sum lutaeftirløn.*

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 12. februar 2026

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Dennis Holm	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	